# 3 frá 3´aranum

FLØGUUMMÆLI

Dagfinn Olsen

## Boney M - 2000




### Disco

Sigast má, at tá tann hvíti og rey›hærdi Frank Farian í sjeytiárunum stápla›i lítta› bólkin Boney M uppá beinini, fann eina dygdargó›a uppskrift. Hóast bólkurin gavst fyri mongum árum sí›ani, so selur tónleikurin enn og vi› millumbilum koma endurútgávur vi› smávegis broytingum.

At ta› so ikki var vælbygdi myrki harrin í bólkinum sum syngur djúpa bassin, men hvíti harrin handan bólkin tyist ikki at hava spilt spæli›.

Verri gekk, tá Farian royndi seg vi› Milli Vanilli, har tveir ungir harrar lótust at synja og fanga›u mong gentuhjørtu. Tá ta› kom fram, at teir als ongan tóna áttu í tónleikinum máttu teir alment koma á sjónvarpsrútin vi› umbering og so var tann søgan - og bólkurin - úti.

Men ta› tekst ikki frá Farian, at ta› eru frálík løg, i› hann fó›ra›i bólkin vi›. Og uppskriftin heldur enn. Boney M stendur fyri eini jólafløgu, i› hoyrist hvørt ár í desember. Og júst nú er ein sonevnd Boney M 2000 komin. 20th century hits. Ta› má ásannast, at Boney M standa fyri nøkrum av stóru hittunum í farnu øld. Á fløguni eru 12 n‡ggj remix, 2 medley og 6 Hot Club Mixes.

Í fløguhúsanum eru myndir av ymsum fer›um runt um í heiminum. Tó er eingin mynd frá meira ella minni vánaligu fer›ini í Føroyum fyrs í 90´unum, har bólkurin spældi einar 20 minuttir.

Men ein fløga vi› “drøni” í og vi› løgum og framførslu eftir uppskriftini, i› saktans klárar nøkur ár afturat.

## Anne Linnet




### Nattog til Venus

Anne Linnet er ein av gó›u gomlu damunum í donskum rocktónleiki. Ein av teim fáu kvinnunum, i› hava klára› at gingi› teinin og sum í dag errin kann standa í fremstu rø› í danska rockli›num.

Longu í sjeytiárunum trein hon á pall vi› bólkum sum t.d. "Shit & Chanel". Eitt skifti var hon gift vi› Holger Laumann, sum spældi vi› Anne Linnet Band. Í Føroyum er hann kendur fyri sín lut í mongum útgávum. Fleiri hjá Tutl og saman vi› Terja og Føstufressum.

Gentubólkurin "Shit & Chanel" var vælumtóktur. Men Anne Linnet hevur megna› at komi› ví›ari alla tí›ina og hevur floti› omaná. Saman vi› t.d. Sanne Salomonsen og Lis Sørensen borgar Anne Linnet fyri tí gó›a danska kvinnurockinum farnu 20-30 árini.

Og nú er ein savnfløga komin vi› Linnet. Ein fløga, i› bæ›i Anne Linnet og lurtarafjøldin hevur uppibori›. Eitt blómutyssi vi› 31 sangblómum. T.d. Cha-Cha-Cha, Barndommes Gade, Tabt mit hjerte, Time, dag og uge og sjálvsagt eisini lagi› Tusind stykker.




## Anne Linnet

### Nattog til Venus

Anne Linnet er ein av gó›u gomlu damunum í donskum rocktónleiki. Ein av teim fáu kvinnunum, i› hava klára› at gingi› teinin og sum í dag errin kann standa í fremstu rø› í danska rockli›num.

Longu í sjeytiárunum trein hon á pall vi› bólkum sum t.d. "Shit & Chanel". Eitt skifti var hon gift vi› Holger Laumann, sum spældi vi› Anne Linnet Band. Í Føroyum er hann kendur fyri sín lut í mongum útgávum. Fleiri hjá Tutl og saman vi› Terja og Føstufressum.

Gentubólkurin "Shit & Chanel" var vælumtóktur. Men Anne Linnet hevur megna› at komi› ví›ari alla tí›ina og hevur floti› omaná. Saman vi› t.d. Sanne Salomonsen og Lis Sørensen borgar Anne Linnet fyri tí gó›a danska kvinnurockinum farnu 20-30 árini.

Og nú er ein savnfløga komin vi› Linnet. Ein fløga, i› bæ›i Anne Linnet og lurtarafjøldin hevur uppibori›. Eitt blómutyssi vi› 31 sangblómum. T.d. Cha-Cha-Cha, Barndommes Gade, Tabt mit hjerte, Time, dag og uge og sjálvsagt eisini lagi› Tusind stykker.



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ítróttin á internetinum www.sosialurin.fo**

# Sámal og Sunvard fjórða brøðraparið

*Í næstan øðrum hvørjum altjóða skrásetta landsdystinum hjá Føroyum hava brøður verið við til at manna liðið*




*Gøtubrøðurnir, Sámal og Sunvard eru báðir við á venjingarleguni í Spania*

Tá Sunvard Joensen mánadagin loysti Jens Martin Knudsen av seinna partin av dystinum ímóti Finnlandi, var beiggi hansara, Sámal Joensen, ein av teimum tíggju liðfeløgunum. Hetta var fyrsta ferðin, at teir báðir vóru á landsliðnum saman, og hetta var fyrsti landsdysturin síðani Kekkia vann 1–0 á Svangaskarði 6. september í 1998, at brøður vóru á landsliðnum.

Umframt teir báðar beiggjarnar úr Gøtu var eisini eitt annað brøðrapar á landsliðnum mánadagin. Kurt og Allan Mørkøre vóru við frá fyrsta bríksli. Hetta var fyrsta ferðin, at teir báðir vóru á landsliðnum saman síðani venjingardystin á Kýpros ímóti Aserbadjan í 1996.

At beiggjar eru á landsliðnum í senn er ikki nakað serstakt í føroyskum landsliðsfótbólti. Hetta er komið fyri í 30 av teimum 64 altjóða skrásettu landsdystunum.

Umframt tey bæði omanfyri nevndu brøðrapørini hava tvey onnur brøðrapør verið á landsliðnum í senn. Henning og Magni Jarnskor vóru seinast á landsliðnum saman 6. september í 1998, og Jens Kristian Hansen og Tummas Eli Hansen vóru síðst á landsliðnum saman í síðsta landsdystinum, sum Tummas Eli spældi. Tað var í Grikkalandi 15. november í 1995.

### Tvær ferðir tveir

Mánadagin var sjeynda ferðin, at tvær brøðragreipur vóru á landsliðnum í senn. Fyrsta ferðin var fyrsta ferðin, tá Allan Simonsen hevði ábygdina. Tá Grikkaland vitjaði á Svangaskarði 7. september í 1994 vóru Tummas Eli og Jens Kristian Hansen á liðnum saman við millum øðrum Magna og Henningi Jarnskor.

Tummas Eli og Jens Kristian Hansen spældu seks ferðir á landsliðnum í senn, og Magni og Henning Jarnskor hava spælt fimtan ferðir á landsliðnum í senn. Í einum landsdysti spældu bæði Magni og Henning Jarnskor, men teir vóru ikki á vøllinum í senn. Tá Finnland var á Svangaskarði 26. apríl 1995, kom Henning Jarnskor á vøllin, tá tað restaðu tíggju minuttir. Hann avloysti Magna Jarnskor.

### Metið

Kurt og Allan Mørkøre vóru teir fyrstu brøðurnir á landsliðnum í senn. Tað var í tiltikna EM undankappingardystinum ímóti Eysturríki í Landskrona 12. september í 1990. Kurt og Allan Mørkøre vóru mánadagin fyri fimtandu ferð á landsliðnum í senn, og um teir báðir vera á vøllinum í senn fríggjadagin, so seta teir eitt slag av meti – fyribils í hvussu so er.

Um Mørkøre beiggjarnir seta met, so er tað sannlíkt, at tað verður standandi í langa tíð. Tummas Eli Hansen er givin at spæla fótbólt í 1. deild, og Magni Jarnskor hevur boðað frá, at hann er ikki tøkur til landsliðsfótbólt. jh

## Lagkøka í La Manga

Í dag er føðingardagur í føroysku venjingarleguni í La Manga í Spania. Ein hin kendasti føroyski spælarin, Todi Jónsson, hevur føðingardag. Hann varð føddur á kyndilsmessu í 1972, og tað vil siga, at hann í dag verður 28 ár. Vit á blaðnum heilsa honum og ynskja tillukku.

# Hondbóltur í kvøld

*Tveir dystir verða leikti í bestu deildini hjá monnum í kvøld*

Jákup Mørk

Talan er um tveir dystir, har oddalið skulu royna at basa botnliðum, og verður gongdin higartil í ár havd í huga, er lítið at ivast í, hvønn veg stigini fara.

### Verða ájavnir vestmenningum

Í høllini á Skála, skal StÍF royna seg móti Tjaldur. Lítið er at ivast í, at strandingar eru stórfavorittar at vinna dystin. Gera teir tað, verða teir ájavnir VÍF í stigum, so lítið er at ivast í, at føroyameistararnir ætla sær tvey stig fyri dystin. Tjaldur var hinvegin um geva VÍF ein undir vangan fyri 10 døgum síðani, so taka strandingar ikki uppgávuna í nóg stórum álvara, er vandi fyri, uppgávan gerst truplari enn ætla.

Hin dysturin verður leiktur í Vestmanna, har kollfirðingar á heimavølli skulu takast við Kyndil. Á sama hátt sum strandingar, eru kyndilsmenn eisini stórfavorittar at vinna henda dystin. Tá liðini hava hitst higartil í kappingini, hevur eingin ivi verið um úrslitið, og taka kyndilsmenn uppgávuna í álvara, áttu stigini at verið vís. Vinnur Kyndil eru teir seks stig aftan fyri oddaliðini, so enn eru teir ikki heilt aftur úr sigldir í dystinum um FM heitið.

Flestu minnast helst, hvussu strandingar lumpaðu øll mótstøðuliðini seinasta ár, so enn er helst ov tíðliga at avskriva kyndilsliðið.

# Danmark tapti eisini

*Umframt dystin ímillum Føroyar og Finnland, sum finnlendingar vunnu 1–0, vórðu mánadagin tveir aðrir dystir spældir í NM kappingini í La Manga í Spania.*

Millum Noreg og Ísland endaði tað málleyst, meðan sviar enn eina ferð endaðu omaná í grannastríði við danir. Úrslitið av stríðnum millum Svøríki og Danmark var 1–0, og sviar skoraðu einasta málið í 21. minutti.

Donsku fjølmiðlarnir vilja vera við, at teirra lið hevði betri uppiborið. Eitt nú vísa teir á, at Peter Møller, hvørs dagliga yrki tað er at sita á beinkinum í sponskum felagi, hevði tvær vandamiklar royndir, og at svensku verjuspælararnir eisini bjargaðu á strikuni.

Í dag er annað umfarið í La Manga á skránni. Tá spæla Finnland og Ísland og Noreg og Danmark. Føroyar og Svøríki halda frí í dag. Innanhýsis uppgerðin teirra millum verður ikki fyrrenn 15. november í ár. Tá fer at verða spælt í innandura høll í Svøríki.

Føroyska liðið, sum vandi tvær ferðir í gjár, skal aftur í eldin fríggjadagin. Tá verður Ísland mótstøðuliðið.

jh